Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bárður á Lakjuni, løgtingsmaður

Svarari: Aksel V. Johannesen, løgmaður

Evni: Trygd og ferðslutrygd í teimum fýra undirsjóvartunlunum

Spurningar:

1. Hvør hevur ábyrgdina av trygdini í teimum fýra undirsjóvartunlunum? Og er nakar eftirlitsstovnur, sum javnan metir um, um trygdin er í lagi?
2. Er tað nøktandi, at allar tær grundleggjandi funksjónirnar í undirsjóvartunlunum – pumpur, viftur o.s.fr. – eru tongdar at vanliga el-netinum einans?
3. Hvussu leingi kann vanliga ferðslan halda á ótarnað, tá m.a. pumpur og viftur eru óvirknar grundað á streymslit?
4. Hvat hevði tað kravt at havt eina alternativa skipan við neyðaggregati/ljósmotori í teimum fýra undirsjóvartunlunum?
5. Eru krøv til vandamikla ferðslu og frakt – t.d. olja, bensin, kemikaliir, gass, trykktangar, spreingievni o.s.fr. – í teimum fýra undirsjóvartunlunum?
6. Eru gomlu ferjulegurnar tøkar og í egnaðum standi, um undirsjóvartunlarnir verða stongdir í longri tíð?

Viðmerkingar:
7. november 2025 setti undirritaði løgmanni, Akseli V. Johannesen, nakrar skrivligar spurningar um trygd í teimum fýra undirsjóvartunlunum. Spurningarnir snúðu seg um møgulig neyðaggregat/ljósmotorar, sum kunnu halda pumpurnar, vifturnar o.a. koyrandi, hóast streymslit í styttri ella í ringasta føri longri tíð.

Út frá svari løgmans kann staðfestast, at elveitingin í øllum teimum fýra tunlunum er 100% tongd at vanligu streymveitingini. Har eru eingi neyðaggregat/ljósmotorar. Tó er ein neyðstreymsskipan, sonevnd UPS-battarískipan, sum veitir neyðstreym í so og so nógvar tímar. UPS'arnir geva ikki høvuðsstreym til pumpur og ventilatión, men geva streym til stýringar, so pumpur og viftur fara ígongd uttan trupulleikar, tá streymur kemur aftur. Eisini er ein tilbúgving tøk, har tangabilar tøma vatn úr brunnunum, til streymurin er afturkomin, og pumpurnar aftur eru virknar.

Undirritaði hevur sjálvsagt ikki førleikar til at meta um, um trygdin í tunlunum er í fullgóðum standi á allan hátt, men uttan iva er hon tað – alt annað vildi verið høpisleyst. Tó lata svar løgmans upp fyri nøkrum spurningum afturat.

Teir 4 undirsjóvartunlarnir hava ómetaliga stóran týdning. Vágatunnilin er einasti vegur og einasta samband okkara til Vágoynna. Vágoyggin er loftvegis lívæðr alra føroyinga út í heim – einasti flogvøllur okkara er staðsettur har. Eingin ferja er at røkja ferðasambandið, um tunnilin ikki er tøkur. Tað er absolutt alneyðugt, at Vágatunnilin er so væl tryggjaður, sum yvirhøvur til ber.

Norðoyatunnilin er einasti farvegur um Leirvíksfjørð. Eingin ferja er at seta inn, um tunnilin ikki er tøkur. Sandoyartunnilin er einasta farleið í Sandoynna. Teistin, sum røkti ferjusambandið, er framvegis í landinum, men hevur aðra fasta farleið at røkja. Tískil er heldur eingin ferja at røkja sambandið, um illa vildi til við tunlinum.

Eysturoyartunnilin er ikki einasta farleið millum Eysturoy og Streymoy, men tunnilin er vorðin eitt øgiligt knútapunkt millum oyggjarnar, og tað koyra túsundavís av bilum í honum dag og dagliga. Tunnilin er vorðin grundleggjandi umráðandi hjá bæði fólki og fyritøkum – harafturat er figgingin av Sandoyartunlinum fullkomiliga samantvunnin við ferðsluna í Eysturoyartunlinum.

Haldi meg minnast, at tá oljubilar skuldu fraktast millum oyggjar við ferjunum, so vórðu sertúrar sigldir, har bert hesir bilar vóru umborð. Allarhelst hevur tað verið tað sama við øðrum vandamiklum kemikalium. Harafturat skuldu gassfløskur og líknandi setast á ávíst stað á ferjunum, har tryggast var at goyma hesar. Í dag sær út til, at allur hesin flutningur ferðast fullkomiliga fríur og ótarnaður í undirsjóvartunlunum, væl blandaður saman við túsundtals persónbilum – umframt lívsneyðugum sjúkrabilum m.a. Um tað eru ávís krøv til hesa ferðsluna, so eru tey torfør at fáa eyga á.

Fyri at fáa greiði á hesum óvissum, so verða hesir spurningar settir løgmanni, ið varðar av undirsjóvartunlunum.

Á Løgtingi, 20. november 2025

Bárður á Lakjuni